KRINGVARP FØROYA

**Jarðfeingi** **Tórshavn 15. Januar 2026**
**Att.: Niels Christian Nolsøe**

Víst verður til klagu tína vegna Jarðfeingi um útvarpsinnsløg og netgreinar hjá Kringvarpi Føroya tann 8. og 9. januar 2026, sum viðgera jarðfrøðiliga grundarlagið fyri ætlaðu tunnilsleiðina úr Djúpadali til Sandvíkar.

Kringvarpið hevur gingið klaguna gjølla ígjøgnum og samanborið innihaldið í sendingum og greinum við jarðfrøðiligu frágreiðingina, sum Jarðfeingi hevur skrivað sum grundarlag fyri lógaruppskotið um fyrireiking, projektering og útboð av Suðuroyartunlinum (Jarðfeingi Report JF-J-2025-05).

**Linjuføringin og eyka kanningar**

Kringvarpið er samt við Jarðfeingi í, at setningurin "Jarðfeingi mælir til, at økið við Skarvanes verður jarðfrøðiliga kannað nærri, áðrenn linjuføringin til Suðuroyðatunnilin verður løgd endaliga" er óheppin orðað, og at seinni parturin "áðrenn linjuføringin til Suðuroyartunnilin verður løgd endaliga" ikki átti at verið tikin við. Hetta er ikki nakað, sum journalisturin er komin fram til, men bleiv strammað til eina yvirskrift til útvarpstíðindini á døgurða tann 8. januar.

Tað, sum Kringvarpið hevur lagt dent á í tíðindaflutninginum, er tó tað fakliga innihaldið í tilmælinum í frágreiðingini (Jarðfeingi Report JF-J-2025-05), har Jarðfeingi mælir til fleiri boringar og nærri kortlegging í økinum við Skarvanes, tí tunnilin, sambært linjuføringini 1A, fer ígjøgnum sama tektoniska øki tríggjar ferðir.

Í journalistiskum samanhangi er tað sakligt at lýsa hetta sum, at grundarlagið fyri linjuføringingina ikki er fullfíggjað enn, og at mælt verður til eyka kanningar, áðrenn projekteringin fer víðari. Hetta er ein tulking av fakliga innihaldinum – og ikki ein pástandur um, at Jarðfeingi hevur sett absolutt krøv.

**Jarðfrøðiliga óvissan undir Skarvanesi**

Kringvarpið tekur til eftirtektar, at Jarðfeingi í klaguni leggur dent á, at økið við Skarvanes er væl kannað, og at óvissan har er minni enn í økjum, sum ikki eru kannað í sama mun. Samstundis staðfestir Jarðfeingi í rapportini (Jarðfeingi Report JF-J-2025-05), at ein stórur asymmetriskur faldur er staðfestur, og at hann kann skapa ósamsvar millum dátur, og tí er eyka arbeiði neyðugt fyri at fáa meiri vitan um hetta.

Í hesum høpi metir Kringvarpið, at tað var journalistiskt forsvarligt at brúka orðalag um óvissu og tørv á nærri kanningum, tá talan er um eina verkætlan av hesi stødd og týdningi. Kringvarpið hevur ikki tikið støðu til, hvussu lætt ella trupult tað er at byggja tunnilin, men einans endurgivið, at Jarðfeingi sjálvt mælir til fleiri kanningar.

**Yvirskriftir og vinkling**

Yvirskrift og undiryvirskrift í greinini tann 9. januar vóru ætlaðar at lýsa, at løgmaður politiskt metir, at "ongar reyðar lampur lýsa/blunka", meðan Jarðfeingi fakliga mælir til fleiri jarðfrøðiligar boringar. Hetta er

KRINGVARP FØROYA

ikki ein pástandur um, at Jarðfeingi er í andsøgn við løgmann, men ein lýsing av, at politisk og faklig sjónarmið leggja dent á ymisk viðurskifti.

At Jarðfeingi, sum liður í síni uppgávu, mælir til fleiri kanningar, er, sum Jarðfeingi sjálvt vísir á, vanligt í stórum tunnilverkætlanum. Samstundis er tað ein kjarnuuppgáva hjá Kringvarpinum at lýsa, at slík faklig tilmæli eru givin, eisini tá politiska metingin er, at verkætlanin sum heild verður hildin at vera innan fyri tryggar og ásettar karmar.

**Niðurstøða**

Kringvarpið metir tí, at tíðindaflutningurin er í samsvari við innihaldið í jarðfrøðiligu frágreiðingini og við góðan journalistiskan sið.

Samstundis taka vit viðmerkingarnar frá Jarðfeingi til eftirtektar og hava tær við í víðari arbeiðinum við at vera greið og neyv í framsetingini av fakligum viðurskiftum.

Vit takka fyri, at tit hava vent tykkum til Kringvarpið, og eru altíð sinnað at hava eitt gott og opið samskifti um, hvussu fakligar frágreiðingar verða endurgivnar í almenna orðaskiftinum.

Um tit hava spurningar ella viðmerkingar í mun til omanfyristandandi, frætti eg aftur.

Henda avgerð kann eisini, sambært § 34, stk. 3 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 kærast til:

**Fjølmiðlanevndina, Gongin 7, 100 Tórshavn**

**ella við telduposti til:** fmn@fjolmidlanevndin.fo

Kærufreistin er fýra vikur eftir, at avgerðin er móttikin.

Vinaliga

Magnus Dam, stjóri

Kringvarp Føroya